# Smyril var bíðitíðina verdur

**Hesin Smyrilin er eitt veruligt frambrot fyri Suðuroyingar, segði løgmaður**

NÝGGI SMYRIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Nýggi og gamli Smyril við bryggju á Tvøroyri. Ikki skerst burtur, at eitt sindur av muni er á skipunum*

Nýggi Smyril var bíðitíðina verdur.

Tað helt Jóannes Eidesgaard, løgmaður, tá ið hann var við til at taka ímóti nýggja Smyrli leygardagin. Hann minti á, at tað var fyri júst 110 árum síðani, at tann fyrsti Smyrilin stevndi inn á Trongisvágsfjørð. Mortensensmenninir lótu hann byggja í Malmø til innanoyggjasigling. Nú tann fimti Smyril stevnir inn á sama fjør, eru tey 162 bruttotonsini hjá fyrsta Smyrli vorðin til næstan 13.000 BRT, 160 HK dampmaskinan er vorðin til 18.300 HK maskinorku, og tær 70.000 kr., ið var byggikostnaðurin í 1895, eru vorðnar til á leið 270 milliónir krónur.

So tað er munur á skipum.

– Í meira enn eina øld hava Smyrlarnir havt ein ótrúligan týdning fyri suðuroyingar og teir hava verið ein sannur partur av okkara samleika og ein ímynd av Suðuroynni. Hetta er okkara samband við umheimin. Smyril er okkara úthurð, og hann er okkara vegur út í heim.

Løgmaður vísti á, at tað størsta og veruliga frambrotið í sambandi við suðuroyarsiglingina kom í 1975, tá ið Smyril kom, sum nú verður lagdur.

– Tá varð veruliga hugsað stórt. Smyrilin undan honum flutti seks, sjey bilar, sum allir skuldu hivast umborð, men Smyrilin, sum kom í 1975, var ein bilaferja, sum tók 100 bilar, ið allir kundu koyra umborð.

Hann vísti á, at nógv vóru reiðiliga ivasom um tað var rætt at keypa eitt so stórt skip til innanoyggjasigling.

– Men tíbetur vóru verulig framburðsfólk, sum søgdu, at jú betur ferðasambandið var, tess fleiri fólk fóru at ferðast – at Smyril var landsvegurin hjá suðuroyingum til restina av landinum. Og rætt fingu tey.

Nú nýggjur Smyril kemur, kann frambrotið ikki heilt samanberast við 1975. men kortini er talan um eitt veruligt frambrot.

– Tá vit sóu henda Smyril fyri fyrstu ferð, tá hann fyri trimum vikum síðani varð doyptur í Spania, vóru allir føroysku gestirnir á einum máli um, at talan var um eitt framúr vakurt skip, har vit síggja spanskt handverk, tá tað er best, og eg veit, at hetta skip verða vit øll glað fyri og góð við, segði løgmaður.



*Ikki minst hava børnini fingið rúmari ræsur umborð á nýggja Smyrli við biografi og spæliplássi*



*Her hevur Gutti úr Vági tikið stýrisvøl í hond í einum spæliplássi á nýggja Smyrli*

# Nýggi Smyril uppførir seg væl

**Í øllum vanligum veðri fer nýggi Smyril ikki at rulla, sigur Magnus Magnussen, sum eigur sín stóra leiklut í, at nýggi Smyril er blivin tað skipið, hann er**

NÝGGI SMYRIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Tað var ein stórur dagur at koma inn eftir Trongisvágsfirði við einum nýggjum skipi, sigur Magnus Magnussen. Hann eigur ein høvuðsleiklut í, at nýggi Smyril er blivin tað skipið, hann er blivin. Her stendur hann á brúnni á nýggja Smyrli*

– Nýggi Smyril uppførir seg væl og í øllum vanligum veðri fer hann ikki at rulla.

Tað sigur Magnus Magnussen.

Eisini fyri hann var tað ein stórur dagur, tá ið nýggi Smyril kom til Føroya leygardagin.

Hann eigur nevniliga ein høvuðsleiklut í tí, at nýggi Smyril er blivin tað skipið hann er.

Hann var tekniskur stjóri á Strandferðsluni, tá ið byggingin varð fyrireikað og hann hevði eftirlitið við bygginini fyri Strandferðsluna til fyri einum sløkum ári síðani, tá ið hann fór í annað starv sum stjóri á skipasmiðjunum í Havn og á Skála.

Tá hevði hann arbeitt við nýggja Smyrli í næstan fimm ár.

Í hesum sambandi búði hann eisini í Spania í hálvtannað ár fyri at kunna hava betri eftirlit við bygginini.

## Livir munandi minni

Nú nýggi Smyril varð liðugur, fekk Magnus Magnussen høvi at vera við til at sigla hann heim.

Og hann er avbera væl nøgdur við endaliga úrslitið.

Nýggi Smyril svarar ógvuliga væl til tað, sum vit sóu fyri okkum, tá ið vit fóru undir byggingina.

Og úrslitið er eitt skip, sum ber seg ótrúliga væl í sjónum.

– Á heimferðini høvdu vit 25 metrar um sekundið, men tað gjørdi ikki mun.

Hann sigur, at aldan var ikki so stór, men tað sást og merktist, at talan er um eitt sera gott skip.

Nýggi Smyril hevur eisini stabilisatorar sum stinga tríggjar metrar út frá skipssíðununum og tískil gera ógvuliga góðan stabilitet og í øllum vanligum veðri fer Smyril ikki at rulla og tað er stórur munur á, at nýggi Smyril fer at liva minni enn tann gamli, sum nú fer úr sigling, sigur hann.

– Tað vit upplivdu á heimferðini, svarar akkurát til tað, vit sóu í modellroyndunum, sum vórðu gjørdar, so tað sær væl út.

Magnus Magnussen fegnast eisini um, at bæði manning og fólk, sum heild, hava tikið ómetaliga væl ímóti skipinum.

## Fyrireikingin alt at siga

Hann sigur, eitt, sum hetta hevur lært hann, er, hvussu ómetaliga stóran týdning tað hevur at fyrireika eitt slíkt projekt væl.

– Vit høvdu sett nágreinilig krøv til, hvussu vit vildu at skipið skuldu vera. Og vit brúktu nógvan pening uppá at gera ein góðan sáttmála við sponsku skipasmiðjuna, har vit brúktu bæði føroyskar, danskir, enskar og spanskar løgfrøðingar og serfrøðingar at hjálpa okkum við sáttmálanum.

– Fyrireikingarnar vóru so mikið góðar, at spanska skipasmiðjan hevði onki annað væl uttan at gera Smyril lidnan, so tað loysti seg at fyrireika byggingina væl, sigur Magnus Magnussen.